# STØRV Á LANDSSJÚKRAHÚSINUM

## Avloysari fyri deildarergoterapeut

Deildarergoterapeuturin á Psykiatrisku deild hevur funnið sær nýggjar avbjóðingar. Tí søkja vit eftir einum avloysara fyri hana til okkara vælvirkandi toymi av ágrýtnum og positivum starvsfeløgum. Starvið er sett til 37 tímar um vikuna og er frá 15. september 2008 ella eftir avtalu til og við 30. september 2009.

Vit bjóða tær eitt arbeiðspláss í stórari menning, har tú fært møguleika fyri fakligum og persónligum avbjóðingum. Starvið er spennandi, har arbeiðsuppgávurnar eru sera fjølbroyttar. Vit nýta m.a eina kanadiska fyrimynd sum fatanargrundarlag, og arbeitt verður við dokumentatión.

**Um Ergoterapiina:**
Ergoterapiin hevur tvey høvuðsøkir, sum fevna um psykiatriska- og somatiska viðgerð. Í løtuni hevur Ergoterapiin felags leiðara, sum dagliga virkar á somatiska økinum og ein deildar-ergoterapeut, sum dagliga virkar á psykiatriska økinum.

Í Ergoterapiini eru í løtuni 7 ergoterapeutar. Av teimum eru 4 innan tað psykiatriska økið, íroknað deildarergoterapeutin og 3 innan tað somatiska økið, íroknað leiðandi ergoterapeutin.

**Um arbeiðið:**
Ergoterapiin á psykiatrisku deild viðger brúkarar frá øllum psykiatriskum deildum, umframt ambulantar brúkarar. Vit arbeiða sentralt í ergoterapiini og veita tænastu til ymisk toymir, sum eru sett á stovn á Psykiatriska deplinum.

**Arbeiðsøkið hjá deildarergoterapeutinum**
- arbeiðir undir leiðandi ergoterapeutinum og hevur dagligu leiðsluna av Ergoterapiini á Psykiatrisku deild
- skal samskipa tær ergoterapeutisku arbeiðsuppgávurnar á psykiatriska økinum
- skal luttaka í viðgerðini av brúkarunum
- skal halda seg kunnugan við menningina innan ergoterapiina
- skal ráðgeva og vegleiða starvsfólkunum í ergoterapiini

**Deildarergoterapeuturin** skal vera áhugaður í at luttaka í spennandi avbjóðingum, kunna vísa áræði, vera opin fyri nýggjum tiltøkum og vilja verða við til at útbyggja tað tværfakliga samstarvið við aðrar fakbólkar. Vit leggja dent á persónligar eginleikar so sum fleksibilitet, greiða talu og humor.

**Nærri fæst at vita** um arbeiðstíðir, arbeiðsuppgávur o.a við at venda sær til Súnu Mørk, deildarergoterapeut, tlf. 304500, lokal 5785 ella Turið Jacobsen, leiðandi ergoterapeut, tlf. 304500 lokal 5781.

**Umsóknarfreistin er** 11. august 2008 kl. 12.00

## Kost- og føðslufrøðingur

Vil tú royna nakað nýtt? Hvat við einum ári í Føroya størsta køki, sum er ein sjúkrahúskøkur á Landssjúkrahúsinum. Vit kunnu bjóða nýggjar royndir, góðar upplivingar og breiðari sjónaring fyri restina av lívinum.

Vit leita eftir einum nýggjum kost- og føðslufrøðingi til setan 18. august 2008 ella eftir avtalu til og við 17. august 2009.

Arbeiðstíðin er 40 tímar um vikuna og liggur innan fyri tíðarkarmin kl. 7.00 og 18.25 við vakt 4. hvørt vikuskifti.

**Framleiðslan**
Framleiðslan í Køkinum kann bera heitið "cook and serv.", og verður borðreidd á deildunum og í Matarhøllini. Harafturat kemur framleiðsla av serligum kosti.

**Arbeiðsplássið**
Vit eru ein vælvirkandi stápur, sum er samansettur av 10 kost- og føðslufrøðingum, 4 økonomum, 3 lærlingum og 11 køkshjálpum.

Arbeiðshýrurin er góður – eisini í pressaðum umstøðum.

**Vit bjóða tær:**
- eitt spennandi starv við framleiðslu av mati sum høvuðsuppgávu
- eitt arbeiðspláss við ávirkan á arbeiðsplanlegging og ábyrgd fyri dagliga rakstrinum
- dugnaligar og fúsar starvsfelagar, sum dáma at hava tað stuttligt í dagliga degnum

**Vit vænta av tær:**
- at tú er útbúgvin kost- og føðslufrøðingur
- at tú brúkar tína fakligu vitan
- at tú er góð/ur til at samstarva við, tá toymisandi er eitt lyklalorð hjá okkum
- at tú hevur hug til broytingar og at víðka tín sjónarring

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Karl J. Granz, telefon 30 45 00, lokal 1260, t-postur: lskargr@ls.fo

**Umsóknarfreistin er** 27. juli 2008 kl. 12.00.

## Læknaskrivarar til Medisinska depilin

Á Medisinska deplinum eru 2 føst fulltíðarstørv leys at søkja til setan 1. september 2008.

**Førleikakrøv**
- útbúgving sum læknaskrivari
- dugir at raðfesta arbeiðið, sum til tíðir er krevjandi
- góð samstarvsevni
- góður røkjuskapur
- teldukunnleiki

**Nærri fæst at vita** um starvið við at ringja til Sæunn Ó. Hansen, leiðsluskrivara á tlf. 304500, lokal 6103.

**Umsóknarfreistin er** 18. august 2008 kl. 12.00

## Onnur størv (sí meira á www.lsh.fo)

[redacted]

Lønar- og setanartreytir samb. sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið. Umsóknin skal vera Lønar- og starvsfólkadeildini í hendi, áðrenn freistin er úti. Skrivlig umsókn við CV, autorisatión, prógvum, skjølum o.l. skal sendast til:

**Landssjúkrahúsið, Lønar- og starvsfólkadeildin, FO 100 Tórshavn**







# Á LANDSSJÚKRAHÚSINUM

- er sjúklingurin í miðdeplinum
- eru umleið 200 seingjarpláss
- eru umleið 20 læknafakligar sergreinir
- eru psykiskar og somatiskar seingjardeildir
- eru umleið 800 fólk í starvi í roykfríum umhvørvi
- er virðiligur samverutóni óansæð kyn, húðalit, politiska-, átrúnaðarliga- ella seksuella orientering

Landssjúkrahúsið J.C. Svabosgøta 100 Tórshavn Tel: +298 30 45 00 Fax: +298 31 42 53 lsh@lsh.fo www.lsh.fo